Kristina Háfoss
løgtingsmaður

Nr. 35/2019

Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52a

Fyrispurningur um, at landsstýrið trýstir stórmál ígjøgnum Løgtingið hóast manglandi upplýsing og viðgerð, settur landsstýrismanninum í fíggjarmálum, Jørgeni Niclasen (at svara skrivliga eftir TS § 52a)

1. Hví skulu stórmál, so sum umfatandi broytingar í pensjón og fiskivinnu, trýstast og skundast ígjøgnum Løgtingið í desember 2019?
2. Hví er ikki møguligt hjá andstøðuumboðum í Løgtingins Fíggjarnevnd at fáa neyðugu haldførisútrokningarnar, hóast biðið er um hesar?
3. Hvør er samlaði kostnaðurin fyri landskassan og kommunurnar (býtt á kommunur) av teimum trimum pensjónsuppskotunum, ið landsstýrið hevur lagt fyri Løgtingið, tá tey eru sett í verk, umframt ár 5,10,15, 20 og 25?
4. Hvussu ávirka lógaruppskotini fíggjarliga haldførið komandi árini, samsvarandi tí haldførismyndli, ið hevur verið brúktur í sambandi við pensjónsnýskipanararbeiðið? Í mió. kr. og í % av BTÚ, ár 5, 10, 15, 20 og 25?
5. Kommunurnar missa við uppskotunum stórar inntøkur. Er ætlanin at veita kommunum endurgjald fyri mistu inntøkurnar? Um so er, hvussu?
6. Pensjónsnýskipanin varð samtykt í fjør við semju tvørtur um samgongu og andstøðu. Hví er ongin roynd gjørd at fáa semju um broytingar, nú umfatandi broytingar aftur verða framdar?

Viðmerkingar:

Eins og í desembur 2011, tá Fólkaflokkurin, Sambandsflokkurin og Miðflokkurin júst høvdu tikið við landsins leiðslu og trýstu forskatting, søguliga stóra pensjónsskattahækking, og flatskatt ígjøgnum, so verða aftur nú stór og sera grundleggjandi mál skundað og trýst ígjøgnum Løgtingið – uttan neyðuga viðgerð og uttan lýsing av veruligu avleiðingunum. Hesa ferð eru tað fiskivinnulóggávan og pensjónslóggávan, ið skulu skundast ígjøgnum.

Tykist sum einasta endamálið er at forða fyri, at Løgtingið og almenningurin fáa neyðugu tíðina at viðgera málini. Tí hví skulu tey annars skundast ígjøgnum, uttan hoyringar, uttan neyðugar útrokningar av fíggjarligum avleiðingum, og uttan neyðugu viðgerðina í løgtingsnevndunum?

Eitt av stórmálunum, ið nú skulu trýstast ígjøgnum Løgtingið, eru umfatandi broytingar í pensjónsnýskipanini. Ongin verulig viðgerð hevur verið av hesum málum. Hetta hóast talan er um eitt mál, sum grundleggjandi broytir skatta- og pensjónsviðurskifti og ávirkar allar føroyingar. Sagt verður, at leyslig meting er, at uppskotini kosta landi og kommunum 123 mió. kr. fyrsta árið, og helst kosta uppskotini fleiri 100 mió. kr. komandi árini. Men hetta er alt bert git, tí tað ber ikki til at fáa landsstýrið at gera neyðugu haldførisútrokningarnar.

Málið hevur heldur ikki verið til hoyring, áðrenn tað varð lagt fyri Løgtingið, og nú málið hevur verið til viðgerð í Løgtingsins Fíggjarnevnd og Trivnaðarnevnd, hevur ikki verið møguligt at fáa neyðugu viðgerðina og neyðugu upplýsingarnar fram.

Andstøðuumboðini í Fíggjarnevndini hava eisini biðið um hesar upplýsingar, bæði í Fíggjarnevndini og frá Fíggjarmálaráðnum, men samgonguumboðini í Fíggjarnevndini og Fíggjarmálaráðið hava ikki ynskt at koma við upplýsingunum.

Løgtingið eigur altíð at taka avgerð á fult upplýstum grundarlagi. Tað er ikki møguligt í samband við pensjónsmálini, tí Løgtingið fær ikki neyðugu upplýsingarnar. Hetta er ein stórur fólkaræðisligur trupulleiki.

Í eini roynd at fáa neyðugu upplýsingarnar til vega, verður hesin grein 52 fyrispurningur settur landsstýrismanninum í fíggjarmálum.

Biðið verður um, at svarið fæst, áðrenn pensjónsmálini koma til endaliga atkvøðugreiðslu í Løgtinginum.

Á Løgtingi, 9. desember 2019

Kristina Háfoss